# ítróttur

Nr. 247 • leygardagur • 28. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Seinastu fyrireikingarnar

**Lars Nedergaard leggur í løtuni seinastu hond á fyrireikingarnar til frammanfyristandandi EM-undankappingardystirnar**

HONDBÓLTS-LANDSLIÐ
*Jákup Mørk*


*Janus Einar Sørensen úr Kyndli stríðist við skaða í knænum, og saman við Eli Müller úr VÍF hevur hann givið avboð til Finnlandsferðina hjá landsliðnum*

Tað eru nú bert fáir dagar til føroyska A-landsliðið í manshondbólti skal til Finnlands, har fyrstu dystirnir í EM-undankappingini eru á skránni, og í løtuni eru leikarar og venjarar í ferð við at fáa allar seinastu fyrireikingarnar frá hondini.

Beint fyri jól savnaðust allir landsliðsleikararnir, og fyrsta málið var at skera brutthópin upp á 17 leikarar við tveimum, soleiðis at ein endaligur 15-manna hópur kundi skrásetast.

At sortera teir seinastu frá, er ongan tíð nøkur løtt uppgáva, men hesa ferð gav liðið seg sjálvt hjá Lars Nedergaard. Eli Müller úr VÍF og Janus Einar Sørensen úr Kyndli dragast nevnliga báðir við skaða, og eftir samráð við fysioterapeutin Klæmint Isaksen gjørdu teir báðir av at melda avboð hesaferð. Landsliðið hevur í januar eina sera strævna dystarskrá, har leikararnir skulu ígjøgnum seks krevjandi dystir, og tí var ikki hildið ráðiligt at senda hálvskaddar leikarar avstað, men heldur leggja doyðin á at fáa teir tøkar til onkran av hinum dystunum.

### Tveir dystir

Undan fráferðini til Finnlands nýggjársdag hevur landsliðshópurin tveir dystir á skránni. Tann fyrri av hesum var leiktur fríggjadagin eftir evstamark okkara ímóti einum liði, sum var samansett av útlendskum leikarum í føroysku kappingini, og var tað Kyndils-venjarin, Jacob Jónsson, sum skuldi taka hetta liðið út.

Hin dysturin verður leiktur sunnudagin í Hoyvíkarhøllini ímóti einum sonevndum pressuliðið. Emil L. Jacobsen, ítróttarskrivari á Dimmalætting, hevur hesaferð tikið liðið út, og framgongur hópurin, sum Dia Midjord hevur ábyrgdina av, aðrastaðni á síðuni.

## Landsliðið

| | |
|---|---|
| Jens á Skipagøtu | Team Amager |
| Jóhan L. Danielsen | Kyndil |
| Sveinur Justinussen | StÍF |
| Áki Olsen | VÍF |
| Bárður Brimvík | H71 |
| Tróndur Joensen | Team Amager |
| John Zachariasen | VÍF |
| Halgir Dahl Olesen | H71 |
| Ingi Olsen | VÍF |
| Heini H. Joensen | GV Ejby |
| Martin Hummeland | Ajax/Farum |
| Áki G. Olsen | VÍF |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil |
| Mads T. Jensen | Team Amager |
| Høgni Klein | Kyndil |

Venjari: Lars Nedergaard
Hjálparvenjari: Hjalmar Klein Olsen

## Pressuliðið

Óla Kristian Djurhuus, KÍF
Lars L. Black, Kyndil
Bent Djurhuus, stÍF
Birgir Kass, Neistin
André F. Danielsen, StÍF
Alexandur Johansen, StÍF
Helgi Justinussen, Neistin
Ragnar Stakksund, Neistin
Agnar Joensen, VÍF
Jens Martin Knudsen, Tjaldur
Kári Mortensen, Neistin
Jónleif Sólsker, Kyndil
Bjarni Wardum, H71

Útskiftingsleiðari: Dia Midjord

## B68 setur fólk í umsitingina

Einki er at ivast í, at arbeiðsuppgávurnar í einum føroyskum fótbóltsfelag gerast alt meira umfatandi og krevjandi. Tíðin, har sjálvbodnar kreftir tóku sær av øllum tí, sum gerast skuldi, er so smátt við at fara, og nú hevur B68 á Toftum so gjørt at taka eitt stig á leiðini í so máta.

Á heimasíðu felagsins hevur felagið nú boðað frá, at Petur Thomsen frá árskiftinum at rokna er settur í starv sum umsitingarleiðari í felagnum. Petur Thomsen er 62 ára gamal, og hevur eina drúgva fortíð sum millumleiðari í Føroya Banka. Í fyrsta umfari verður talan um hálvtíðar starv, og skal Petur taka sær av allari dagligu fyrisitingini í felagnum.

**-jm**



# Øll hava møguleikan

**Enn tykist einki lið hava funnið neyðuga støðufestið, og tí mugu seks lið framvegis sigast at hava møguleikan fyri gullmerkjunum í bestu kvinnudeildini**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

VB staðfesti oddastøðuna í grundspælinum, tá tær vunnu tryggan sigur á Tjaldur í Runavík.

Allan dystin á tamb høvdu gestirnir fult tamarhald á tí, sum gekk fyri seg, og tói at Tjaldur royndi at muta nakað ímóti soleiðis av og á, so var ongan tið nakar veruligur spenningur um úrslitið.

Við sigrinum fingu vágbingarnir eisini endaliga staðfest, at tær í øllum førum hava munin, tá farið verður undir endaspælið. Hvussu stórur hesin munur verður, veldst tó um, hvussu tað fer at spæla av, tá VB í seinasta umfarinum vitjar í Vestmanna. VÍF hevur kanska ikki somu styrki, sum tær hava havt tey bæði seinatu gullárini, men lítið er tó at ivast í, at hetta líkst størstu uppgávuni hjá VB higartil.

Í Havn skuldi Neistin og Stjørnan dystast um, hvær teirr skuldi krøkja seg í oddin, og hendan dystin vann Stjørnan. Yvir høvur var talan um ein sera spennandi dyst, har nervin ongan tíð fór úr spælinum, men í seinasta enda vóru tað so gestirnir úr Klaksvík, sum vóru tær kaldaru.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum var á Strondum, har Kyndil kom á vitjan. Seinastu mánaðirnar hevur talan fyri tað mesta verið um ein langan niðurtúr hjá Kyndli, men móti StÍF, sum annars hevði møguleikan at leggja seg heilt út í oddastríðið, bragdaði brádliga aftur. Frá fyrsta bríksli vóru gestirnir grammar eftir stigunum, og um hetta verður lagið í endaspælinum, so kann væl vera, at Kyndil fer avstað við onkrum av heiðursmerkjunum.

Støðufesti er tó ikki nakað, sum hevur eyðkent Kyndil í vetur, og yvirhøvur hava liðini í kvinnudeildini sýnt sera misjøvn avrik í ár. Og tað er ivaleyst fremsti setningurin hjá fleiri av venjarunum, tá vit skjótt koma til eitt endaspæl, har øll uttan avbyrgda Tjaldur á aftasta sessinum, tykjast hava møguleikan í gullstríðnum.


## Vetrarferðatilboð

14.09.2002 - 10.05.2003

The North Atlantic Link



galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.

Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum. Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.

**Ebeltoft** (myndin) **• Blokhus • Hirtshals**

**4.995,-**
*gisting 7 nætur*

Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.




**Shetland Cruise**

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

**Íroknað prísin er:** Ferðin aftur og fram við Norrönu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.

Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

**Pakkaferð** við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Quenns Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |




**Easterhoull Chalets**
1 vika í summarhúsi
*2 vaksin og 2 børn við bili*

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |

team85

**Pakkaferð við gisting á hotelli**
*2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm*
*fyri hvønn* **3.290,-**
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari v. WC/bað. Uppihald: 7 nætur á Hotel Hanstholm í dupultkamari við WC/bað. Á hotellinum er morgunmatur íroknaður.



**2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!**
galdandi til og við 3. mai 2003
*Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað*
**2.990,-**



**2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!**
galdandi til og við 3. mai 2003
*Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað*
**2.200,-**



e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo

SMYRIL LINE
Tel 34 59 00





Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið. Í Føroya Sparikassa starvast 181 fólk. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Á marknaðardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 4 fólk.

## Samskiftisfólk

Vit leita eftir samskiftisfólki til at menna og framleiða kunnandi tilfar hjá Sparikassanum.

Høvuðsuppgávan hjá samskiftisfólkinum er at viðlíkahalda heimasíðuna og saman við eini heimasíðuredaktión at skapa eitt livandi og kundavinarligt umhvørvi á heimasíðu Sparikassans.

Aðrar uppgávur eru at vera við í redaktiónini fyri Kunningartorgið, ið er dagligi kunningarmiðilin hjá starvsfólkum Sparikassans, og at orða søluskriv, tíðindaskriv og annað.

Visión okkara er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum, og tað ynskja vit sæst aftur í tí skrivliga tilfari, ið verður gjørt til miðlar og kundar okkara.

Vit ynskja okkum ein starvsfelaga, ið hevur ein léttan penn, og er før/ur fyri at orða ein fakliga tungan tekst á léttan hátt. Vit vænta, at tú skrivar føroyskt til lítar.

Tú hevur útbúgving innan samskifti, journalistikk ella líknandi. Harafturat hevur tú lætt við at seta teg inn í nýggja kunningar- og heimasíðutøkni.

Í løtuni starvast 4 fólk á marknaðardeildini. Arbeiðsøkið fevnir um marknaðarføring, ráðgeving og samskifti.

Arbeiðshátturin á marknaðardeildini er merktur av tøttum samstarvi, og at øll eru til reiðar at taka eina hond í, tá á stendur – sama, hvat uppgávan snýr seg um.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Ólav Jensen,
marknaðarleiðara
e-mail: olavur.jensen@sparikassin.fo
tel 348 540

Umsóknarfreistin er 15. januar og umsóknirnar saman við prógvum og C.V. skulu sendast til:

Føroya Sparikassi
Att.: Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðari
Postboks 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

REPROZ